## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, ið vístu okkum samkenslu og henni æru, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Diny Heinesen**

doyði og varð jarðað.

Takk til Martin Restorff Jacobsen, prest, fyri góð orð í kapellinum og til jarðarferðina. Takk til kirkjutænarar, sangarar, gravarar og tykkum, sum hjálptu so væl til ervið.
Takk fyri blómur og kransar og fyri peningagávur til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim. Takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til tykkum mongu, sum tóku tykkum so væl av henni hesi seinastu nógvu árini.

*Familjunnar vegna*
**Hanus og Martin**

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Elsa Maria Fanny Anthoniussen**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Hanus Simonsen, prest, fyri troystarrík orð, tá kistan kom heim í kirkjuna og til jarðarferðina.
Tøkk til Ólav, mammubeiggja, fyri vakran sang til mammu okkara á hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur, og fyri hjálp og stuðul til jarðarferðina og ervið.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jón, Fróði og Heðin**

# Stuðulstiltak í Løkshøll

Sunnukvøldið 6. desember kl. 19 verður eitt stuðulstiltak í Løkshøll í Runavík til frama fyri Rumeniahjálpina. Tiltakið verður skipað sum ein sangløta.

Tað er samkoman Elim í Søldarfirði, sum stendur fyri tiltakinum. Ljós verður varpað á tað hjálpararbeiði, sum verður gjørt í Rumenia, og fólk fáa møguleika at vera við til at stuðla arbeiðinum. Tað kostar ikki at koma inn, men tað verður høvi at lata eina peningagávu, meðan tiltakið er. Allur peningurin sum kemur inn fer óskerdur til at hjálpa einstaklingum, trongdum familjum, barnaheimum og Aids-raktum í økinum.

Nógv ymiskt fólk framføra sum t.d. TOS við Bárði á Lakjuni, Brita og Eli Smith, Jóhannes Poulsen, Jens Chr. Olsen, Jóannis S. Hansen, Hallur Joensen, Kristina Bærentsen og duddi, eins og Beinta og Absalon Áargarð við dukkunum. Myndafrásagnir og filmsklipp verða víst millum framførslurnar, har Andrea Isaksen og Anna Maria E. Antoniussen greiða frá um hjálpararbeiði. Eisini verður nógvur felagssangur. Fyrireikararnir siga, at øll eru vælkomin til hetta kvøldið, her verður okkurt til fólk í øllum aldri. Tiltakið endar við einum drekkamunni til øll.



*Anna Maria E. Antoniussen er ein av fyrireikarunum*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Johannes Hansen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Nýrafelagið og takk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Sólbjørg,**
**Milly, Eleina, Sámal Johannes og Norðbjørt við familju**

Jólatilboð



Kjólar í øllum litum og sniðum til sølu

Opið er fríggjadag og leygardag frá 13.00 til 17.30
Ella við at ringja á 272212
Klæðnahandil 1001 Nátt
Mikkjalstrøð 11

1001 nátt
– a touch of the Orient

# MERKISDAGAR

**Prógv**
17. nov. 2009 fekk Magni Glyvradal á Keymannahavnar Universitetið handað prógv sum cand. cient í fysik. Nevnast kann at hann fekk hægst prógvtal til prógvtøkuna.

**65 ára føðingardagar**
Leygardagin 28. nov. halda Eyðun og Elsebeth Maria Johannesen føðingardag í Eydnuni á Oyrabakka, frá kl. 18.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 25. nov. verður Fredrik Jacobsen, Klaksvík, 90 ár. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansskúla, Garðavegur 11, leygardagin 28. nov. frá kl. 16.

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppa diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 27. nov. hava Anna og Jákup Kass, Strendur, diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 28. nov., saman við familjuni.

**Diamantbrúðleyp**
Mánadagin 30. nov. hava Paula og Peter F. Christiansen verið gift í 60 ár. Dagurin verður hildin 29. saman við børnunum á Jagtvej 213, 7-4, 2100 København Ø.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 4. des. kl. 10 giftast í Sørvágs kirkju, Tórgun Jørleifsdóttur úr Sørvági og Hans Petur Lamhauge av Skála. Dagurin verður hildin í missiónshúsinum Libanon í Sørvági frá 13-17, har øll eru hjartaliga vælkomin.



Starvsfólk til
Føroya landsbókasavn

Søkt verður eftir

**Avloysara fyri 1. bókavørð** í barnsburðarfarloyvi frá 25. januar til 13. september 2010. Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna.

**Samskipara til avgreiðsluna** at seta 1. februar 2010 ella skjótast til ber. Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna.

Umsóknarfreistin til bæði størvini er 21. desember 2009 kl. 12.00. Les meira á www.flb.fo undir Leys størv.

FØROYA LANDSBÓKASAVN